## 5. Grønland ikki tvingast til veðurlagsavtalu

Í Grønlandi ávara fakfeløg og onnur politikararnar ímóti at staðfesta eina veðurlagsavtalu, sum fer at seta Grønlandi so strong krøv um CO2-útlátið, at tað fer at darva vinnumenningini. Nú kemur fólkatingsmaðurin Lars Emil Johansen upp í sama kórið. Við KNR sigur hann, at tað ber ikki til at tvinga grønlendingar til at fylgja einari tílíkari avtalu, um onnur lond sleppa undan. Lars Emil Johansen sigur, at Grønland fer júst nú undir at byggja sín búskap upp, og tí eiga slík krøv ikki at forða menningini.



## Við gummigeit í bankan

Nakrir mmenn, sum tíðliga í morgun brutu inn á ein banka í danska býnum Gjerlev nærhendis Randers, tóku sær eingi óráð fyri.. Teir høvdu stolið eina gummigeit, sum teir rendu inn ígjøgnum bankaveggin. Síðani fóru teir avstað við tveimum bankaboksum, skrivar Ritzau. Løgreglan heldur, at menninir tóku tær báðar boksirnar upp í kjaftin á gummigeitini, sum so setti tær upp á ein lítlan lastbil. Fyrrapartin var ikki heilt greitt, hvussu nógvar pengar tjóvarnir fingu við sær, men helst er talan millum eina hálva og eina millión krónur.

# Sterk rúsevni meira vanlig

**Tollvaldið hevur seinnu árini merkt eina broyting í rúsevnisbrúkinum í Føroyum. Higartil í ár eru fleiri smuglarar tiknir, enn vanlig ár, og samstundis eru tað meira sterk rúsevni og minni hassj, ið verður smuglað**

RÚSEVNI
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Turru tølini vísa ikki at tað verður smuglað meira til landið nú, enn tað hevur verið áður. Hinvegin bendir alt á at tað eru fleiri sterk rúsevni, ið koma til landið, samstundis sum at eftirspurningurin av hassji er minkaður.

- Tølini vísa ikki nakra ógvusliga broyting, sigur Kjartan D. Joensen, yvirtollari.

Tollvaldið hevur tikið fleiri smuglarar higartil í ár, enn teir vanliga gera í eitt heilt ár, men samstundis eru nøgdirnar minni nú, enn tær hava verið áður.

- Vit síggja oftari at fólk royna at smugla innvortis, og tá er tað ofta verri at fáa fatur á. Rúsevnini verða vanliga koyrd í hítir ella í Kindaregg, og tá kunnu tey svølgja tað ella koyra tað uppí seg, greiðir yvirtollarin frá.

### Sterk rúsevni meira útbreidd

Tollvaldið fekk í fjør ein nýggjan servandan hund, og hava teir tískil tveir hundar nú. Tað hevur effektiviserað arbeiðið hjá Tollvaldinum í samband við rúsevni sera nógv. Hesir hundar, vanliga kallaðir hassjhundar, eru eisini vandir til at lukta onnur rúsevni, og tískil eru líkindini fyri at tú verður fangaður í tollinum størri. Fleiri eru eisini fangað í ár.

- Vit síggja at nøgdirnar eru minni, men at tað oftari eru sterkaru rúsevnini, ið roynt verðu at smugla. Vit síggja meira av amfetamin, kokain og ecstasy, samstundis sum hassj sjáldnari kemur fyri. Men heroin síggja vit næstan einki til, sigur Kjartan D. Joensen.

### Meira at gera um jóltíðir

Sambært tollvaldinum verða fleiri smuglarar tiknir um jólini, enn aðrar árstíðir.

- Tað eru ofta fólk, sum búgva í Danmark og sum ferðast í hasum umhvørvinum nirði, ið koma heim at halda jól. Tey hava ofta okkurt uppi á sær. Vit hava altíð eitt vakið eyga við ferðafólkunum, men tá hava vit eitt serliga vakið eyga, tí erfaringin frá undanfarnum árum sigur okkum, at tá eru fleiri fólk, ið royna at smugla eitthvørt til landið, fortelur Kjartan D. Joensen, yvirtollari.

Samanumtikið verða tað ikki smuglaði fleiri rúsevni til landið, men heldur sterkari rúsevni, enn fyrr.



# Brúka unga kvinnur til at smugla

**Innvortis rúsevnissmugling er blivin alt meira vanlig, og samstundis verða fleiri og fleiri ungar gentur og kvinnur útnyttaðar til at smugla rúsevni til landið**

RÚSEVNI
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Ecstasy, amfetamin, kokain og tablettir. Tað er alsamt vanligari fongur hjá Tollvaldinum. Men samstundis er ein annar trendur við at stinga seg upp. Tað er nevnliga at alsamt fleiri ungar gentur og kvinnur verða brúktar til at smugla rúsevni.

Fyrr í ár vórðu tvær ungar gentur dømdar fongsulsrevsing fyri rúsevnissmugling, og sambært narkopolitiinum er hetta ein trend á veg upp.

- Vit síggja oftari nú at ungar gentur verða brúktar til smugling. Tær verða brúktar sum kurerarar fyri bakmenn, og tað eru ungar gentur og kvinnur generelt. Ofta eru tær í forvegin í trupulleikum av rúsevnum og sjálvar brúkarar. Psykan hjá kvinnum í slíkum trupulleikum er eisini nemmari at manipulera, og tær verða útnyttaðar til at flyta rúsevni til landið, greiðir Brynjer Johannesen frá Narkopolitiinum frá.

Samstundis er innvortis smugling vorðin alt meira vanlig, og tá hava kvinnur eisini fyrimun í mun til menn við tað, at tær fáa smuglað meira, um tær koyra pakkarnar uppundir seg.

Sambært Brynjer Johannesen eru bæði narkopolitiið og Tollvaldið blivin meira tilvitað um hetta slag av smugling, og tí verður meira eisini gjørt við at kanna fólk, um hundarnir vísa serligan áhuga fyri fólki, og einki er at finna uppi á teimum.



*Innvortis smugling er alt meira vanlig. Vanliga verða hýtir ella Kinder egg brúkt sum hylki*

